## Marseille vil hava Drogba

Í 2004 fór Didier Drogba úr Marseille, har hann bert vísti síni kynstur í eitt ár. Nú er eitt ár eftir av sáttmálanum við Chelsea, og nú sigur formaðurin í Marseille, at tað hevði verið ein dreymur at fingið Drogba aftur, tá tíðin hjá honum í Chelsea er liðug. – Øll vilja hava Drogba aftur til Marseille, og eg fari at kann, um tað ber til, og um vit hava ráð til hann, sigur Jean Claude Dassier, sum er formaður í Marseille, við Le JDD í Fraklandi. Drogba hevur altíð verið jaligur, tá hann tosar um árið hjá sær í Marseille.



## Eg vildi altíð til Madrid

Tá Cristiano Ronaldo í fjør tosaði um, at hann vildi verða sum Giggs, so var tað bert spæl. Hetta viðgongur hann, fáar dagar áðrenn hann flytur til Madrid. – Tá vit høvdu vunnið Champions League, føldi eg ikki, at eg kundi uppnáa meira í Manchester United. Tá mann hevur gjørt alt, sum mann kann í einum stað, so hevur mann brúk fyri einari nýggjar avbjóðing. Eg var verandi eitt ár afturat, og eri fegin um meistaraheitið, men tað var altíð ætlanin at fara til Real Madrid, sigur Ronaldo sambært AFP. Ronaldo verður dýrasti spælarin nakrantíð, tá hann flytur.



*Bogi Hermansen hevur við einum dundurskoti syrgt fyri fyrsta B36-sigrinum í níggju umførum. Og liðskiparin, Klæmint Matras, er skjótur at takka fyri málið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

B36-07 Vestur 2-1 (0-1):

# Møguleikin fór á vestfalli

*B36*

*07Vestur*

**07Vestur hevði nóg nógvar málmøguleikar til at punktera dystin í øðrum hálvleiki. Men teir tóku ikki av, og seinastu løtuna fór B36 við øllum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað vóru tvey kroyst lið, sum fór á vøllin í Gundadali, seint seinnapartin leygardagin. Óhugaliga støðan á stigatalvuni merkti tað manglandi undirhaldið í fyrra hálvleiki. Longu í fyrsta minuttinum kom Bergur Midjord í eina góða støðu, men Trúgvi Askham í O7-Vestur málinum vardi væl fyri. Aftaná tann málmøguleikan gjørdist nærmast talan um tómgongd í ein heilan hálvleik.

Tór Ingar Akselsen hevði eitt skot frá 20 metra fjarstøðu, men annars hendi sera lítið í nærum 40 minuttir. Bæði liðini høvdu lítið at bjóða uppá, men so kom knappliga meiri ferð á dystin. Tá 39 minuttir vóru farnir kom Tór Ingar Akselsen at standa væl fyri. Tór Ingar trekti framvið tveimum verjuspælarum hjá B36, og plasseraði bóltin væl framvið Jóan Paula Jacobsen í B36-málinum, og 07Vestur var á vinnarakós.

### Kundu avgjørt

B36 vóru framvegis tannleysir fyrra partin av øðrum hálvleiki. 07Vestur hevði tríggjar góðar málmøguleikar hesa løtuna, har vágamenn kundu økt um leiðsluna, og harvið tryggja sær leiðsluna í dystinum.

Longu tá fýra minuttir vóru farnir kom Da Silva at standa í einari góðari støðu í B36-brotsteiginum, men hann skeyt við síðunnar av. Tá eitt stórt korter var farið fekk Jóhan Petur á Stongum ein stóran møguleika at skora til 2-0, men hann stútaði upp um málið.

Tá 67 minuttir vóru farnir, fekk Da Silva tann størsta málmøguleikan, tá hann í einari fríari støðu við einum kavandi stútara ikki fekk umsett møguleikan til eitt mál. Bólturin fór dygst framvið stongini.

### B36 vaknar

Tá 70 minuttir eru farnir vaknar B36. Heimaliðið gjørdist meiri málsøkjandi, og Klæmint Matras stútaði á yvirleggjaran. Løtu seinni fær Da Silva ruddað burtur frá málstrikuni hjá 07Vestri.

B36 helt áfram við at trýsta. Tá 85 minuttir vóru farnir fær verjan hjá 07Vestur ikki ruddað bóltin burtur av vandaleið. Sjúrður Thomassen finnur Magnus Olsen, sum frá stuttari fjarstøðu fær sett bóltin framvið Trúgva Askham til 1-1.

Men skaðin skuldi gerast enn størri hjá vágamonnum. Fimm minuttir vóru lagdir aftrat, og í yvirtíðini fær Bogi Hermansen við einum dundurskoti lagt B36 á odda við einum sera væl plasseraðum skoti, sum sat dygst í uppi í horninum.

Fagnaðurin var so stórur hjá B36-spælarunum, at ein skuldi trúð at teir høvdu lagt seg á odda í Vodafonedeildini, men hjá tí svanga er alt søtt.

Talan var um ein seksstigsdyst. Ístaðin fyri, at munurin bert gjørdist trý stig millum liðini á stigatalvuni, so gjørdist munurin níggju stig.

## Høvdu uppiborið betri

Tór Ingar Akselsen sat einsamallur á útskiftingarbeinkinum eina góða løtu aftaná dystin, hann var skiliga vónbrotin um, at 07Vestur ikki fekk sigurin til hølda ímóti B36.

– Eg haldi, at vit høvdu uppiborið betri enn einki stig í Gundadali í dag. Tór Ingar ásannar, at stóru málmøguleikarnir sum Da Silva og Jóhan Petur á Stongum misbrúktu gjørdist dýrir.

– Høvdu vit skorað uppá bara ein av hasum trimum møguleikunum, so trúgvi eg uppá, at vit høvdu fingið sigurin í hús. Tá tað so ikki hendir, og teir skora uppá tilvildarligar málmøguleikar, so er tað ræðuliga harmiligt. Hesin dysturin og dysturin ímóti EB/Streymi (3-5 tap red.) hava tikið serliga hart. Vit hildu fast, og vóru á odda leingi, men í báðum førum taptu vit ímóti endanum, og tað er ræðuliga tungt, staðfestir Tór Ingar Akselsen.

Tór Ingar slær eisini fast, at teir hava ikki mist mótið í 07Vestur:

- Vit vísa dyst aftaná dyst, at vit væl kunnu vera við, og í dag vóru vit so tætt við, sum vit kundu vera yvirhøvur kundu vera.

*-heris*

## Ein hjartalig gleði hjá okkum øllum

Tað var ein ógvuliga lættur B36-venjari, Mikkjal Thomassen, vit høvdu á tráðnum aftaná dystin.

– Vit spæla við einum ótrúliga ungum liði. Vit mangla nógvar spælarar, vit hava Brima Koroma uttanfyri. Vit hava Jákup á Borg, Fróða Clementsen og Hanus Thorleifson uttanfyri, og Sam Malsom er ikki væl fyri, tí hann hevur havt virus. So vit spæla við einum ungum og óroyndum liði, og aftur eru vit óhepnir.

- Teir fáa eitt mál burturúr ongum, og tá síggji eg at hálsurin knekkar á spælarunum, men tað tóku vit og viðgjørdu í steðginum, har eg heitti á teir um at velja tær einføldu loysnirnar og flyta bóltin, so skuldi málmøguleikarnir nokk koma.

- Ferð kom á, aftaná nakrar útskiftingar, har nakrir ungir spælarar koma inn og vísa vegin fyri hinar, og trúgva uppá møguleikan, og tað sær ógvuliga gott út teir seinastu 20 minuttirnar, har vit skapa eitt hava málmøguleikum, og 07Vestur er púra vekk ta síðstu løtuna, staðfestir Mikkjal Thomassen.

Mikkjal ásannar, at sigursmálið hjá Boga Hermansen var ein forloysingur hjá øllum liðnum:

- Vit søktu hatta málið ógvuliga hart, og tað var heilt fantastiskt, ein sær tað á okkara andlitsbrøgdum, at tað er ein hjartalig gleði hjá okkum øllum. Vit hava søkt tað í so nógvum dystum nú, og nú sóu vit, at tað riggaði, greiðir ein lættur Mikkjal Thomassen frá.

*-heris*